gur, hvør er hóttanin?

harleiðarafundurin í ST

TING-HELLAN

Russland heldur serliga fast um sín leiklut í Trygdarráðnum og vil ikki geva nakað vald frá sær. Er kanska seinasta restin frá stórveldisdøgunum.

Er heldur ikki fegin um at broyta Trygdarráðið, enn í hvussu so er. Gongur tó inn fyri at taka av landbúnaðarstuðulin.

so er at hini londini, sum veita sínum stuðul eisini gera tað. Fyri at fáa eina betri heimshandilsskipan og fríhandil, bleiv heitt á WTO um at koma við eini greining av hvat skal til, og at WTO fundurin í vetur skal loysa málið.

Brasilski forsetin Lula vísti á, at tað er burturúr vón og viti, at seks reisurnar tað upphædd, sum er mett neyðug fyri at røkka millenium goals málinum fyri at steðga hungri, verða brúktir til landbúnaðarstuðul í ríku londunum. Henda útsøgnin sigur helst nógv um hvussu vit í ríkara partinum av heiminum í veruleikanum raðfesta. So er spurningurin um størsta hóttanin er yvirgangur ella hungur, tí eitt nú USA og Rusland meta at ljósið skal varpast á yvirgang, meðan eitt nú danski forsætisráðharrin metir at HIV/AIDS eigur verða raðfest hægst.

Egin áhugamál

Bush vísti við síni røðu at ST fyri USA er fyri at ansa eftir egnum áhugamálum, men samstundis legdi hann í røðuni dent á tørvin í menningini av fátækum londum, eisini sum ein partur av stríðnum ímóti yvirgangi. Hesin toppfundurin vísti at arbeiði í ST enn í stóran mun er um at tryggja egin áhugamál, sum aftur ger tað so torført at fáa semjur, sum øll vita gagna heiminum. ST er onkursvegna fakfelagið hjá heimsins fullveldislondum og tey ansa eftir sínum áhugamálum. Broytingarnar hesa ferð eru ikki nóg stórar, men ein tilgongd við broytingum er sett í gongd. Stóri spurningurin er um broytingarnar steðga her, ella hetta er byrjanin til eina altumfatandi bygnaðarbroyting í ST? Tað vita vit ikki fyrrenn um nøkur ár. Tann semjan sum undan toppfundinum fekst millum limalondini, kann ikki sigast at vera nøktandi, og tí fæst ikki eitt nøktandi úrslit av toppfundinum, og tí fær ST í hesi setuni ikki sett skjøtil á tær umfatandi broytingarnar í felagsskapinum, sum m.a. Aðalskrivarin Kofi Annan hevði vónað. Men broytingar eru har. Londini eru samd um at arbeiða fram eftir 2015 málunum, semja er um at mannarættindaspurningurin skal loysast ørðvísi, semja er um at leggja størri orku í at fyribyrgja fólkamorðum og semja er um at fáa eina heimshandilsskipan, sum gevur 3. heimslondunum størri møguleika at klára seg.

Frameftir, men…

Nakað er komið av skafti. Langt er eftir at røkka tí máli, sum Kofi Annan setti fram í vár í ætlanini "In Larger Freedom", sum hann hevði vónað at fingið samtykt í ár. Hinvegin skal altíð nógv leggjast fyri, soleiðis at ein samráðingarsemja kann røkkast. ST er farið eitt vet frameftir, men als ikki nóg mikið. Komandi árini verða avgerandi fyri um vit fáa eina líðandi menning og broyting av felagsskapinum, ella at hetta eru *broytingarnar* vit skulu liva við nógv ár frameftir. Fáa vit ikki størri broytingar enn hesar, verður ST verandi ein tung og ótíðarhóskandi skipan, sum ikki fær styrkt sín leiklut sum *alheimsfelagskapurin*. Ein broyting í ST er, at trygd og stabilitetur er gott, men tíðin er komin til at rættvísi eisini skal inn í skipanina. Tí er neyðugt at broyta Trygdarráðið, fáa eina nógv betri arbeiðgongd um mannarættindini og eina rættvísari heimshandilsskipan. Smáar broytingar eru, og bert um Aðalfundurin megnar at gera eina dynamiska semju um mannarættindi og WTO um handilin, so kann sigat at tað gongur rætta vegin. Kanska ikki í nóg stórum, men tó í nøktandi fetum, um so er at broytingarnar eru partur av eina áhaldandi tilgongd. .



Lula hevði vóna at fingið sess í nýggja Trygdarráðnum, men hartar annars ríkaru londini fyri ikki at arbeiða nóg mikið við fátækraspurninginum